## Prinsipiell sparing

**Páll á Reynatúgvu vil skera stuðulin til uppihaldspening burtur. Bæði fyri at spara til ein sjálvberandi búskap og av prinsipiellum orsøkum**

BARNAPENGAR
*Ingi Rasmussen*

Ein sjálvabarndi búskapur er málið. Tí noyðist Páll á Reynatúgvu at spara fyri at tillaga búskapin.

Tað hevur landsstýrismaðurin áður gjørt greitt í einum almennum lesarabrævi. Men tað er eisini av prinsipiellum orsøkum, at stuðulin verður skerdur.

»Eftir at tey gjaldsskyldugu hava fingið stuðul til uppihaldspening úr landskassanum, sita tey í dag við eini útreiðslu fyri hvørt barnið, sum er góðar 400 krónur um mánaðin. Tað er eftir mínum tykki eingin orsøk til, at allir landsins skattaborgarar skulu gjalda fyri, at henda útreiðslan skal vera so lág. Eg eri væl vitandi um, at tað eisini eru fólk, ið gjalda hækkaðan barnapening og konupening. Men hesar upphæddir verða ásettar í mun til samlaðu fíggjarstøðuna hjá gjaldsskylduga, sum sostatt eigur at megna hesa útreiðslu,« skrivaði Páll á Reynatúgvu í mai í ár.

Andstøðan førir hinvegin prógv ímóti at skerja stuðulin. Kristian Magnussen og Andreas Petersen søgdu soleiðis í álitinum í Trivnaðarnevndini fyrr í ár:

»Hevði samgongan havt ein veruligan familjupolitikk og viljað gjørt nakað munagott fyri tey børnini, ið fáa barnagjald, átti hon at syrgt fyri at vanliga gjaldið hækkaði heldur enn at leggja stein oman á byrðu hjá teimum, ið verða rakt, um uppskotið verður samtykt. Uppskotið hevur bæði fíggjarligar og sosialar avleiðingar fyri flestu teirra, ið rinda uppihaldspening, og eisini fyri børn og fyrrverandi hjúnafelagar, ið móttaka.«



*Føroysk børn, sum liva hjá einum av foreldrunum, ið eru farin frá hvørjum øðrum, fáa 811 krónur um mánaðin. Samtykkir løgtingið at strika stuðulin til uppihaldspening, skulu pápar rinda tvífalt fyri, at teir ikki búgva saman við sínum børnum*

*Savnsmynd*

# Øll missa – uttan landskassin

**Hevur pápin tvey børn, sum búgva hjá mammuni, skal hann rinda eina heila mánaðarløn eyka í barnapengum um árið. Tá ið av tornar missa mamman og børnini pening at liva fyri, tí gjaldførleikin hjá pápanum versnar munandi. Tað er sostatt bara landskassin, sum fær tað betri av, at stuðulin til uppihaldspening verður skerdur burtur í einum høggi**

BARNAPENGAR
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Tað er bara landskassin, sum vinnur pening burturúr uppskotinum hjá Pálli á Reynatúgvu, landsstýrismanni við almannamálum, at strika stuðulin til barnapengar.

Páparnir, sum oftast eru teir, ið rinda barnapening, fáa eina stóra meirútreiðslu. Mammurnar, sum fáa barna- og uppihaldspengar frá fyrrverandi hjúnafelagnum, fáa eisini minni, tá av tornar. Og harvið er minni eftir til at nøkta tørvin hjá børnunum.

Tað vísa skjølini í málinum um uppihaldspening, sum enn einaferð skal standa sína roynd í løgtinginum. Tað er dottið burtur tvær ferðir áður. Øll andstøðan í løgtinginum er ímóti uppskotinum, men roknast kann við, at samgongan atkvøðir tað ígjøgnum hesaferð við minst møguligum meiriluta – 17 atkvøðum fyri og 15 ímóti.

### Tvífaldir barnapengar

Tá foreldur fara frá hvørjum øðrum, er tað aloftast mamman, ið fær børnini. Pápar skulu so rinda barnapengar. Í dag eru barnapengarnir 811 krónur fyri hvørt barnið. Páparnir fáa kortini helvtina av upphæddina endurrindaða frá Almannastovuni.

Verður stuðulin til barnapening skorin burtur, sparir landskassin sambært uppskotinum 8 milliónir krónur árliga. Sambært útrokningum hjá Sosialinum eru sostatt góð 1600 børn fevnd av barnapengunum.

Civildirektoratet, sum umsitur lógina í Danmark, hevur boðað frá, at lógaruppskotið fer at hava við sær, at nýggjar vegleiðingar fyri áseting av uppihaldspeningi til hjúnafelagar og børn undir 18 ár verða gjørdar fyri Føroyar soleiðis, at ásetingin fer at lækka.

Fyri at taka barnapengarnar fyrst. Um lógaruppskotið verður samtykt, merkir tað, at pápin missir stuðulin, sum er helvtina av teimum 811 krónunum. Tað vil siga, at har hann áður rindaði 4822 krónur um árið, eftir at stuðulin var endurgoldin, skal hann í dag rinda 9.732 krónur um árið fyri hvørt barnið. Hevur hann tvey børn skal hann sjálvandi rinda 19.464 krónur um árið, sum svarar til eina miðalgóða mánaðarløn.

**Fakta**

1644 børn í Føroyum fáa barnapengar.
Hvørt barn fær 811 krónur um mánaðin.
Pápar, ið oftast rinda, fáa helvtina endurgoldið.
Eftir 1. januar 2004 dettur endurgjaldið helst burtur.
Sostatt skulu pápar rinda 9.732 krónur um árið fyri hvørt barnið.

So galið verður tað helst ikki kortini, tí danska sivilstýrið vísir á, at tú skalt rinda eftir førleika, og tí mugu upphæddirnar til uppihaldspening minkast.

### Mamman missir

Hevur pápin eina ávísa inntøku, og mamman hevur lítið at liva fyri, so hevur hann eisini skyldu til at rinda sínum fyrrverandi hjúnafelaga uppihaldspening. Sivilstýrið nýtir sum dømi, at manninum hevur verið álagt at rinda konuni 4.000 krónur um mánaðin í uppihaldspeningi. Hendan upphæddin er ásett eftir, hvat maðurin er førur fyri at gjalda. Nú hansara nettoinntøka minkar munandi, verður hendan upphædd skerd hareftir.

Sivilstýrið sigur, at verður stuðulin til uppihaldspening skerdur missur maðurin eina nettoinntøku á 24.000 krónur árliga. Tað svarar til, at bruttoinntøkan, sum er grundarlagið fyri útrokningini, má setast niður við 48.000 krónum. Sjálvur stuðulin minkar sostatt niður í 12.000 krónur um árið, og verður sostatt 3.000 krónur um mánaðin.

Av tí at páparnir ikki kunnu rinda meira, enn teir makta, verður teirra skylduga upphædd sostatt minkað, soleiðis at teir megna at svara hvørjum sítt. Tað eru altso mamman og barnið, ið mugu gjalda fyri, at stuðulin til páparnar dettur burtur.

### Mismunur av kyni

Umframt ríkisumboðið og danska sivilstýrið eru onnur eisini biðin um at ummæla uppskotið. Teirra millum er Javnstøðunevndin.

Annika W. Joensen vísir á, at uppihaldspeningur ikki er nevndur í lógini um javnstøðu, og tí er málið ikki eitt vanligt javnstøðumál. Men hon sigur í somu vending, at verður hugt at avleiðingunum at uppskotinum, sær støðan øðrvísi út.

– Veruleikin er nevniliga tann, at tað í allarflestu førum eru menn, sum verða verri stillaðir fíggjarliga, um uppskotið verður samtykt. Hetta tí tað í Føroyum oftast eru mammur, sum hava børnini hjá sær, og pápar, sum gjalda uppihaldspening. Á ein hátt kann sigast, at óbeinleiðis verður mismunur gjørdur vegna kyn, sigur Annika W. Joensen, forkvinna í Javnstøðunevndini.





*– Vit vilja fegin hava føroyska ST-felagið so breitt sum møguligt, tí á henda hátt meta vit, at áhugafelagið best tænir sínum endamáli, sigur Justin Philbrow, formaður*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Formaðurin í føroyska ST-felagnum:

# Vit vilja vera eitt portur hjá ST

**Dagurin í dag er av heimssamfelagnum kosin at vera ST-dagur, har kunnað verður um, hvat Sameindu Tjóðir, er, hví ST varð stovnað, og hvat endamálið við felagsskapinum er. Í apríl í ár varð føroyska ST-felagið stovnað. Felagið hevur eina fýramannanevnd, og formaður í áhugafelagnum er Justin Philbrow á Toftum. Í kvøld verður kunnað um ST í býráðshøllini í Runavík**

ST-DAGUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í dag, 24. oktober, verður aðalfundur hjá Sameindu Tjóðum, og samstundis fer felagsskapurin, sum varð stovnaður eftir krígslok í 1945, undir sítt 58. arbeiðsár. Dagurin verður hátíðarhildin á ymiskan hátt kring um heimin, og bæði í Geneve og í New York verða standmyndir avdúkaðar, ið heiðra ST-fólk, sum hava latið lív í friðartænastu.

Eisini í Føroyum verður dagurin hátíðarhildin.

### Prát og hugni

Í apríl í ár varð føroyska ST-felagið stovnað í Havn, og formaður í áhugafelagnum er Justin Philbrow á Toftum. Felagið, sum er óheft politiskt, hevur eina fýramannanevnd við fólkum úr ymiskum heraðshornum í landinum. Hesi hava átikið sær at kunna um fjølbroytta virksemið hjá ST sum felagsskapi – hvat ST er, hví felagsskapurin varð stovnaður, og hvat hann fæst við.

– Í Føroyum verður dagurin eisini hildin. Fólk, sum hava verið við á friðarveitandi herliðnum hjá ST og annars luttikið í ST-arbeiði, fara í kvøld at hittast til prát og hugna. Hetta hevur verið gjørt í fleiri ár, og soleiðis verður eisini í ár.

Justin sigur, at hendan løtan, sum plagar at verða hildin í Mjørkadali, er ikki almenn.

### Alment í Saltangará

Í býráðshøllini í Saltangará verður dagurin eisini hildin, og hetta tiltak er tað fyrsta almenna tiltakið, sum føroyska ST-felagið skipar fyri.

– Í kvøld klokkan 20 verður almennur fundur, har fólk hava høvi at hoyra um Sameindu Tjóðir. Fyrilestur verður hildin, og síðan verður óformligt kjak um ST.

Justin sigur, at føroyska ST-felagið eisini hevur heitt á fjølmiðlar og skúlar í Føroyum um at gera nakað burtur úr degnum.

– Vit vilja fegin, at føroyingar verða kunnaðir um virksemi hjá ST kring um heimin. Uppgávan hjá ST fevnir um mong økir, har friðarvarðveitandi parturin er tann, vit hoyra mest um. Men ST hevur so nógvar aðrar uppgávur, og ein týðandi partur er hjálpararbeiði av ymiskum slag, sigur hann.

### Eitt portur

Justin sigur, at føroyska ST-felagið hevur sama endamál, sum onnur áhugafeløg í londunum kring um heimin, og føroyska felagið arbeiðir við at gerast limur í altjóða áhugafelagsskapinum.

– Í flestu londum, sum eru limir í ST, eru eisini áhugafeløg, ið sum so eru óheft av ST. Hesi feløg hava til uppgávu at kunna fólk um virksemið hjá Sameindum Tjóðum.

Spurdur, um hesi áhugafeløg serliga eru í londum, sum ikki eru limir í ST, sigur Justin, at so er ikki.

– Hesi feløg eru serliga í teimum londum, sum hava ST limaskap.

Hann sigur, at hóast Føroyar ikki hava sjálvstøðugan limaskap í ST, er uppgávan hjá áhugafelagnum ikki minni.

– Vit vilja fegin vera ein portalur ella eitt portur hjá ST – á tann hátt, at vit vilja upplýsa um felagsskapin í Føroyum og fáa fólk at skilja, hví ST er við í teimum tiltøkum, sum felagsskapurin nú einaferð luttekur í.

Justin vísir á, at danska ST-áhugafelagið eitt nú ger nógv burtur úr at upplýsa í skúlum og gera tilfar til undirvísing.

### Føroyar eru við

Formaðurin í føroyska ST-felagnum sigur, at føroyingar partvís eru við í ymiskum ST-arbeiði, eitt nú í hertænastu, løgreglutænastu og í nevndum, sum á ymiskan hátt arbeiða undir ST.

– Men reint politiskt hava vit ikki nakað sjálvstøðugt tilknýti til ST, sigur hann.

Justin leggur dent, at føroyska ST-felagið er óheft politiskt, og tí hevur felagið ikki sum endamál, at Føroyar gerast sjálvstøðugir limir í ST.

– Vit vilja fegin hava áhugafelagið so breitt sum møguligt, tí á tann hátt meta vit, at føroyska ST-felagið best tænir sínum endamáli, sigur Justin Philbrow.